# Ársfrágreiðing 2008



Mynd: MYODA

Uttanríkisráðið
Altjóða menningarsamstarv og neyðhjálp

Endamál og virksemi ........ 4

Menningarsamstarvspolitikkur ........ 4
Sameindu Tjóðir um menningarsamstarv ........ 5
Hvar fer menningarhjálpin ? ........ 6

Menningarsamstarv Lond ........ 7
Jordan ........ 7
Bolivia ........ 8
Indonesia ........ 9
Liberia ........ 10
Senegal ........ 11
Tanzania ........ 13
Rwanda ........ 14
Ghana ........ 14
Malavi ........ 15
Virksemi nevndarinnar ........ 16
Annað ........ 18

Verkætlan enda ........ 18
Indonesia - Fiskivinnumenning og trygd á sjónum ........ 18

Neyðhjálp lond ........ 20
Myanmar ........ 20
Matvørutrot ........ 20

Samstarvspartar ........ 22

Listi yvir menningarlond ........ 24

Neyðhjálp 2008 ........ 25
Myanmar ódn ........ 25
Matvørutrot ........ 25

Fíggjarnýtsla ........ 26

Lóg um altjóða menningarsamstarv ........ 27

**Fyri verðina ert tú bara onkur, men fyri onkran ert tú øll verðin**

Málið um at basa heimsins fátækradømi skal ikki einans verða føgur orð. Eg eri vísur í, at føroyingar taka sum givið, at øll menniskju hava rætt til dagligt breyð, grundleggjandi heilsukor og at læra at lesa, rokna og skriva. Somuleiðis vilja vit eisini taka ábyrgd fyri teimum ættarliðum, ið koma eftir okkum.

Í altjóða menningarsamstarvi taka vit tøk og standa lið um lið við okkara vesturlendsku grannar, sum hava drúgvar royndir innan hetta øki. Tað er umráðandi, at vit nýta menningarsamstarvið á rættan hátt; at vit gera vart við okkum hjá stjórnarfelagsskapum undir Sameindum Tjóðum, og somuleiðis fáa høvi at nýta okkara kunnleika og skapa okkum fleiri royndir.

Tað ríkar okkara samfelag at vit taka lut í menningarsamstarvi, og vit vita, at okkara virksemi er til gagns fyri fleiri túsund fólk. Tørvurin er nærum óendaligur og ofta verður spurt, um stuðulin úr Føroyum munar.

Føroyar fáa neyvan nakrantíð ein avgerðandi leiklut, tá tað snýr seg um at betra umstøðurnar hjá mannaættini, tó kunnu vit uttan at blunka taka til okkum orðini um, at fyri verðina ert tú bara onkur, men fyri onkran ert tú øll verðin.

Í Tinganesi apríl 2009

Jørgen Niclasen

uttanríkisráðharri

# Endamál og virksemi

Høvuðsendamálið við altjóða menningarsamstarvi er at virka fyri at minka um búskaparliga ójavnan í heiminum við burðardyggum menningarsamstarvi.

Umframt at virka fyri hesum máli hevur landsstýrið sett sær fyri at skapa føroyingum og føroyska samfelagnum royndir, kunnleika og áhuga fyri triðja heiminum og altjóða viðurskiftum sum heild.

Fyri at røkka hesum endamáli er avgjørt, at fyrstu árini verður menningarsamstarv útint eftir hesi raðfesting:

1. Menningarhjálp skal bert latast londum, sum OECD skilmarkar sum menningarlond
2. Orka skal leggjast í at byggja upp samstarv við altjóða viðurkendar hjálparfelagsskapir – stjórnarligar sum sjálvbodnar – til tess at vera saman við hesum felagsskapum um menningarverkætlanir
3. Har til ber, skal menningarsamstarvið skapa møguleikar fyri virknari, føroyskari luttøku

ST mælir ídnaðarlondum til at gjalda 0.7% av bruttotjóðarinntøku síni til altjóða menningarsamstarv. Í royndum lata hesi lond bert 0.47% í miðal. ST hevur síðani samtykt, at í 2015 skulu ríku londini halda síni lyfti, og ávegis er sett sum mál, at í 2009 eiga londini at lata 0,5% av bruttotjóðarinntøku síni til hetta arbeiði.

Henda samtyktin hjá ST er einans galdandi fyri sjálvstøðug lond og fevnir tískil ikki um Føroyar. Hóast altjóða samfelagið einki væntar sær av okkum, tykist politisk semja vera um, at Føroyar eiga at seta sær sum mál at lata munandi meiri av bruttotjóðarinntøkuni til arbeiðið. Sum nú er, lata vit 3 mió. kr. til menningarsamstarv, sum í 2008 vóru um 0.03% av bruttotjóðarinntøku. Tað fara við vissu at ganga nógv ár, áðrenn vit náa málinum um 0.7% av BTI, sum í dagsins tølum vildi verið um 80.5 mió. kr., tó eigur tað ikki at forða okkum at seta sum mál, at økja árligu upphæddina við til dømis 0.02%.

Fyrsta lógin um altjóða menningarsamstarv fór úr gildi í mai og 14. mai fingu vit nýggja lóg, løgtingslóg nr. 44 frá 14. mai 2007 um altjóða menningarsamstarv. Kunngerðin um altjóða menningarsamstarv varð lýst í juni 2007 og 1. november sama ár, varð fyriskipan um virksemi hjá ráðgevandi nevndini staðfest.

# Menningarsamstarvspolitikkur

Føroya hava seinastu árini fingið ein alt virknari uttanríksipolitikk, sum m.a. er eyðkendur við fleiri og fleiri virkisøkjum. Altjóða menningarsamstarv er eina virkisøkið, har Føroyar taka ábyrgd sum land og fólk, og luttaka í felagsarbeiðinum at virka fyri at betra um búskaparójavnanum í heiminum.

Hóast vit í krónum og oyrum ikki hava so nógv at gera gott við, liggur okkara partur – almenni og privati – ikki eftir. Føroyar eru viðspælarar og taka medábyrgd. Tað hava

føroyingar gjørt í nógv ár. Upphæddin sum almennu Føroyar lata, er ikki óføra stór, tó eru vit við til at seta dagsskránna á fleiri økjum. (sí verkætlanirnar)

Áðrenn komið verður hartil, at vit antin velja út ávís lond ella heimspartar, at samstarva við, eiga vit at hava drúgvari royndir. Men tá tað kemur til evnir at samstarva um og stuðla, verða útbúgving og heilsa raðfest. Hettar er grundað á, at útgangsstøði fyri menningarsamstarvinum er sjálvberandi menning, og tá er útbúgving grundarlagið. Heilsa er treyt fyri at kunna læra, og tí er heilsa, sum evnið, eisini umráðandi.

Harumframt verður stuðul eisini latin øðrum sektorum, sum byggja á grundarsteinarnar hjá Sameindu Tjóðum.

Men ikki minst er umráðandi, at vit velja at stuðla teim verkætlanum, sum Føroyar og føroyingar eisini kunnu fáa nakað burturúr, tað verið seg innan førleikamenning, vinnu ella annað samstarv.

Menningarsamstarvið verður í høvuðsheitum framt saman við sjálvbodnum hjálparfelagsskapum, sokallaðu Non Governmental Organisations (NGO), men mett verður, at tað eisini er umráðandi at samstarva við stjórnarfelagsskapir. Higartil hevur verið samstarvað við heimsmatvørufelagsskapin, World Food Programme (WFP), hvørs endamál er at basa hungri, at menna føðsluvirðið hjá teimum ið líða hungur og at stuðla undir sjálvberandi menning har mattrot og hungur er.

Eitt av málunum er at byggja upp eitt tætt samstarv við felagsskapir og royna at fáa so nógvan kunnleika og lærdóm sum til ber.

Hinvegin verður mett, at sum støðan er, er játtanin alt ov lítil til tvítjóða samstarv. Í tvítjóða menningarsamstarvi er mannagongdin vanliga tann, at gevaralandið setur móttakaralandinum krøv at ganga á møti, t.d. um at stjórnin í viðkomandi landi skal halda mannarættindini, tryggja ávísa lóggávu osfr. Lutfallið í tílíkum samstarvi vildi í løtuni á ongan hátt verið proportionalt.

## *Sameindu Tjóðir um menningarsamstarv*

Í 2000 blivu limalondini undir ST samd um eina felagsfráboðan um tey mál, sum setast skuldu, til tess at basa fátækradømi í menningarlondunum. Limalondini hava plikta seg at arbeiða samsvarandi hesum málum, sum vanliga verða nevnd 2015Málini.

Málini eru:

- At basa fátækradømi og hungri
- At fremja grundskúla fyri øll
- At fremja javnrættindi millum kynini og styrkja kvinnurnar
- At minka um barnadeyða
- At betra um heilsuna hjá møðrum
- At basa HIV/AIDS, malaria og øðrum sjúkum
- At tryggja burðardygt umhvørvi
- At útvikla altjóða samarbeiði um menningarsamstarv

Hesi mál vóru sett í ár 2000 at arbeiða fram ímóti til ár 2015. Í ársfrágreiðing síni fyri 2008, sigur ST, at altjóða samfelagið hevur tikið til sín tey átta málini, ið nevnd eru omanfyri, hóast at langt er á mál.

Hóast Føroyar ikki hava luttikið í hesum fyrireikandi arbeiði, hava vit valt at taka málini við í menningarsamstarvsarbeiði og at virka samsvarandi hesum málum.

### *Hvar fer menningarhjálpin ?*

Í 2008 varð menningarhjálp latin átta londum. Flestu londini eru í Afrika og tey eru: Liberia, Senegal, Tanzania, Rwanda og Ghana. Harumframt var menningarhjálp latin Suður Amerikanska landinum Bolivia, Jordan í miðeystri og Indonesia, sum er í Asia.

Á myndini niðanfyri sæst í prosentum, hvussu játtanin er býtt millum londini.




Í partinum, sum lýsir londini, verður greitt frá, hvussu stuðulin er nýttur.

Meginparturin av stuðlinum er veittur gjøgnum sjálvbodnir hjálparfelagsskapir, sokallaðir NGO' arar, tó eru 300.000 kr. latnar stjórnarfelagsskapinum WFP til verkætlanina Senegal Country Programme.

Fyrisitingarliga er menningarstuðulin skipaður soleiðis, at allir móttakarar undirritað avtalu, har ásett er, nær verkætlanin verður framd, nær Uttanríkisráðið fær frágreiðing um gongdina í verkætlanini og upplýsingar um, nær Uttanríkisráðið fær roknskap samsvarandi umsóknini hjá felagsskapinum.

Tað eru alt fleiri felagsskapir, sum venda sær til Uttanríkisráðið við umsóknum til ymsar verkætlanir, men av tí, at upphæddin er avmarkað, er ikki møguligt at ganga øllum umsóknum á møti.

Komandi árini verður tí framvegis samstarvað við felagsskapir, bæði stjórnarligar og sjálvbodnar og dentur fer eisini at verða lagdur á føroyska luttøku í verkætlanum.

Harumframt er ætlanin at byggja upp skipan, har føroyingar, sum hava ávísa fakliga bakgrund, kunnu fara út í heim at arbeiða. Ætlanin er, at hetta skal verða skipað gjøgnum Reyða Kross.

# Menningarsamstarv Lond

Búskaparfelagsskapurin undir Sameindu Tjóðum, OECD, skilir menningarlond í fýra flokkar. Flokkingin er gjørdur eftir brúttotjóðarinntøkuni pr. íbúgva, og er flokkað soleiðis:

| Fátækastu lond | Onnur fátøk lond | Undir miðal | Yvir miðal |
|---|---|---|---|
| - | BTI $ upp til 935 | BTI $ 936 -3.705 | BTI $ 3.706-11.455 |

OECD dagførir javnan hetta yvirlit, sum nýliga er sett í gildi, og skal galda fyri 2008, 2009 og 2010. Bólkurin Fátækastu londini verða í yvirlitinum hjá OECD nevnd sera skuldarbundin lond (Heavily Indebted Countries).

Á kortinum niðanfyri síggjast tey lond, sum Uttanríkisráðið hevur latið stuðul til.




## *Jordan*

Uttanríkisráðið hevur stuðlað The Circassian Charity Association, Woman´s Branch (CCA), ið er ein sjálvhjálparfelagsskapur ella NGO í Jordan, við 190.100 kr. til at seta í verk bindiverkætlan fyri kvinnur. Hetta verður gjørt við at framleiða vørur til Guðrun & Guðrun.

Jordan er flokkað í triðfátækasta bólkinum undir flokkingini hjá OECD, og í landinum búgva umleið 6 milliónir fólk.

Endamálið hjá felagsskapinum er m.a. at bøta um fíggjarstøðuna hjá bindikonunum, sum eru 30 í tali. Fyritøkan Guðrun & Guðrun leggur dent á, at pløggini hon selur, verða framleiddar á ein hátt, sum fyritøkan kann standa inni fyri.

Tær jordansku kvinnurnar, sum verkætlanin er fyri, búgva fjarskotið og hava ikki møguleika at møta á vanligum arbeiðsplássi. Tær hava ábyrgdina av húsarhaldinum, og harumframt er ikki siðvenja at tær arbeiða úti. Henda verkætlanin gevur teimum møguleika at vera heima og arbeiða, og á tann hátt vinna sær pening og sjálvræði. Tó hava tær eisini møguleikan at hittast hjá sjálvhjálparfelagsskapinum, har frálæran eisini fer fram.

Í lóg um altjóða menningarsamstarv er ásett, at tá til ber, eigur føroysk vitan og serkunnleiki at verða gagnnýttir. Henda verkætlanin er dømi um, at føroysk vitan og serkunnleiki verða gagnnýtt - vitanin hjá G&G kemur kvinnum í Jordan til gagns, eins og G&G fáa altjóða royndir við verkætlan, sum hevur eitt etiskt støði, har hvørt plagg hevur sína søgu.

Verkætlanin byrjaði í september 2007 og var liðug í august 2008. Verkætlanin er nú sjálvberandi, og arbeiðið heldur fram.



Mynd: Guðrun & Guðrun

## *Bolivia*

589.850 kr. vórðu latnar sjálvhjálparfelagsskapinum Dialogos til arbeiðið teirra at menna verkstaðarskúla í Pallina Laja í Bolivia. Talan er um at dagføra skúla og verkstað á háslættanum.

Bolivia er flokkað í triðfátækasta bólki undir flokkingini hjá OECD, og í landinum búgva 8.8 milliónir fólk.

Dialogos er ein danskur sjálvboðin hjálparfelagsskapur, ið varð settur á stovn í 1983. Stigtakararnir eru fólk við breiðari fakligari vitan og drúgvum royndum innan menningarsamstarv. Danida hevur í fleiri ár verið ein av høvuðsgevarunum hjá Dialogos.

Ætlanin er partur av hugsjónunum, sum stjórnin hevur sett á blað, tó at peningurin hjá teimum ikki røkkur. Bolivia er fátækasta landið í Suðuramerika, og ayamarafólkið hoyrir til allar fátækasta upprunafólkið. Burturflyting millum ung er eitt rák, sum eisini fer fram í

Bolivia. Skúlin skal geva teim ungu møguleika at útbúgva seg heima, og at fáa eitt ítøkiligt skúlaprógv. Ætlanin er hugsað sum ein fyrimynd í boliviansku skúlaskapinum, har praktikkur, formlig læring og málvirðing verða greipað saman til eina eind. M.a. verður undirvíst í seyðarøkt, at hagreiða seyð og um familjubúskap. Roknað verður við, at umleið 40 ung fara at taka fakprógv.



Mynd: Dialogos

Førleikamenningin ger, at tey ungu betri kunnu lívbjarga sær, og at tey kunnu bøta um livikorini á staðnum.

Verkætlanin byrjaði 01. mars 2008 og endar 01. september 2009. Dialogos letur Uttanríkisráðnum og fjølmiðlunum frágreiðing um verkætlanina, og letur inn grannskoðaðan roknskap ein ársfjórðing eftir, at verkætlanin er lokin.

### *Indonesia*

Landsstýrið hevur síðan tsunami í 2004, samstarvað við sjálvhjálparfelagsskapin Mercy Corps. Í 2008 hevur Uttanríkisráðið játtað 627.170 kr. til at seta í verk ætlanina at byggja upp eitt fyrimyndarumhvørvi viðvíkjandi bróstageving.

Indonesia er flokkað í triðfátækasta bólki undir flokkingini hjá OECD, og í landinum búgva um 237 milliardir fólk.

Endamálið við ætlanini er at seta í verk áheitanina hjá ST stovnunum UNICEF og WHO frá 1991 um "Ten steps to Successful Breastfeading". Endamálið við hesi ætlan er at minka um barnadeyða og undirføðslu. Stovnarnir heittu í 1991 á menningarlond, um hvør sær at gera innlendis ætlanir, sum skulu tryggja, at børn fáa móðurmjólk, soleiðis at barna deyðin minkar, og undirføðsla av pinkubørnum verður fyribyrgd.



Mynd: Mercy Corps

Ætlanin í Indonesia verður framd við fyrst at orða skrivligan heilsupolitikk um móðurmjólk. Síðani fáa viðkomandi heilsustarvsfólk frálæru um orðaða politikkin, sum á henda hátt verður settur í verk. Ein partur av verkætlanini er námsferð til Føroya á heysti

2009. Endamálið er at fáa innlit í okkara politikk og mannagongdir á økinum. Hetta verður gjørt saman við Ljósmøðratænastuni og Barnatænastuni.

Heilsupolitikkurin á smábarnaøkinum í Føroyum er á fakliga høgum støði og samskipanin er professionel. Mett verður, at hetta er ein førleiki Føroyar kunnu vera við til at menna og blíva serkøn, í tá talan er um stuðul til menningarlond.

ST arbeiðir støðugt við áheitanini og í november 2007 var eftirmeting gjørd, har m.a. staðfest verður, at áheitanin frá 1991 hevur ført við sær batar í fátæka partinum av heiminum, tó at langt er eftir á mál.

Smábarnadeyði í Indonesia er lutfalsliga høgur, og undirføðsla er ein trupulleiki. Einans 40,5 % av nýføðingum í Jakarta fáa móðurmjólk fyrsta tíman eftir føðing, og børn upp til hálvt ár fáa í miðal móðurmjólk í bert 18 dagar. Kanningar vísa, at smábarnadeyðin hevði minka við 22% um børnini fingu móðurmjólk innan fyrsta tíman eftir føðing.

Heilsustarvsfólkum tørvar vitan um, hvønn týdning móðurmjólk og tætt samband millum mammu og nýføðing hevur, bæði tá tað snýr seg um eyðkvæmi, undirføðslu og sjúkur í andaleiðini. Harumframt er tað ein trupulleiki, at heilsustarvsfólk í ávísan mun fáa fíggjarligan stuðul frá mjólkaframleiðarum, til tess at reklamera fyri og selja eftirgjørda móðurmjólk til smábarnafamiljur.

Verkætlanin er framhald av henni, sum Føroyar stuðlaðu, tá Bjørghild Djurhuus og Jan á Argjaboða vóru í Indonesia sum ráðgevar hjá Mercy Corps í mars 2007. Verkætlanin byrjaði í oktober 2006 og endar í september 2010.

Mercy Corps skal lata Uttanríkisráðnum ávegis frágreiðing í mars 2009 og endaliga frágreiðing og grannskoðaðan roknskap í oktober 2009.

### *Liberia*

Uttanríkisráðið hevur í 2008 stuðla ABC-barnahjálp at arbeiða víðari við byggingini av skúlanum í Liberia við 270.000 kr.

Liberia er flokkað í fátækasta bólki undir flokkingini hjá OECD, og í landinum búgva um 3.4 milliónir fólk.


Mynd: Uttanríkisráðið

Arbeiðið at byggja skúlan byrjaði í 2007, tá Uttanríkisráðið játtaði 927.288 kr. Stuðulin frá landsstýrinum fer til at byggja skúla til foreldraleys børn. Eftir ætlan skuldi skúlin vera liðugur fyrst í hesum árinum. Men av tí at sementprísirnir hækkaðu, og regnið kom fyrr

enn vanligt og førdi við sær at nakað av tilfarið o.ø. varð oyðilagt, hevur upprunaliga fíggjarætlanin ikki hildið.

Uttanríkisráðið hevur móttikið ávegis frágreiðingar og myndir um gongdina viðvíkjandi skúlabyggingini, og hevur á henda hátt havt møguleika at fylgt við verkætlanini.

Eftirlits- og kunningarvitjan var gjørd fyrst í januar 2009. Tá kundi millum annað staðfestast, at skúlin er væl ávegis at vera liðugur, at skúlaleiðslan longu hevur tikið inn 50 børn til skúlagongd, at talan er um álitisfólk, sum taka sær av byggingini, og at nakað av peningi skal til afturat, til tess at skúlin skal gerast liðugur.

Á myndini síggjast Ellen Sirleaf-Johnson, forseti í Liberia og Jørgen Niclasen, uttanríkisráðharri uttanfyri skúlan í Monrovia.



Mynd: Uttanríkisráðið

Á vitjanini varð á fundi við útbúgvingarráðharran, Josef Korto, upplýst, at skúlin fylgir útbúgvingarpolitikkinum í landinum, og at myndugleikarnir skulu góðkenna lesiætlanir og lærarar á skúlanum. Fundur var somuleiðis við Walther T. Gwenigale, almannamálaráðharra, sum m.a. upplýsti, at myndugleikarnir arbeiða við at eyðmerkja foreldraleys børn, og at stjórnarráðið skuldu vera ABC-barnahjálp í Liberia til hjálpar, at eyðmerkja tey børn, sum fáa eitt pláss á skúlanum.

Nýggjastu upplýsingar frá ABC-barnahjálp siga, at skúlin verður liðugur í september 2009, tá skúlin verður vígdur.

Uttanríkisráðið fær frágreiðing og roknskap um verkætlanina í apríl 2009.

## *Senegal*

Á hvørjum ári sendir WFP út áheitan um at stuðla ymsum menningarlondum, tí tey líða hungur. Uttanríkisráðið metir, at tað er umráðandi at Føroyar, eins og onnur lond í vesturheiminum, fylgja samtyktum og áheitanum frá Sameindu Tjóðum, sum í sambandi við mattrot heimsins, hevur heitt á altjóða samfelagið um at stuðla arbeiði teirra at fyribyrgja mattroti og at basa hungri.

Í 2007 mælti WFP til, at Føroyar stuðlaðu verkætlan í Senegal, og í 2008 valdi Uttanríkisráðið at stuðla somu verkætlan.

Uttanríkisráðið hevur nýliga fingið upplýsingar frá WFP um verkætlanina í Senegal sum vísa, at fýra lond luttaka í hesi menningarætlan. Tey eru Føroyar, Italia, Luxenburg og Canada. Londini hava samanlagt stuðla verkætlanini við 2.738.707 USD, harav Føroyar hava latið 4.79% ella 700.000 kr. Umframt nevndu lond, eru eisini fleirtjóða felagsskapir, ið stuðla.

Peningurin verður nýttur til eina verkætlan, sum nevnist Senegal Country Programmes. Henda verkætlan fevnir um trý ymisk átøk, og fer fram í tíðarskeiðinum 2007-2011, hon er mett samanlagt at kosta 20 mió. USD, og fer at gagna 960.000 fólkum í fimm ár.

Senegal er flokkað í fátækasta bólkinum undir flokkingini hjá OECD, og í landinum búgva um 11.6 milliónir fólk.



Mynd: WFP Nancy Palus

Átøkini eru hesi:

- **Undirføðsla.** Endamálið er at fyribyrgja undirføðslu hjá børnum undir 5 ár og at fyribyrgja jod mangul, serliga í økjum har goitre er (sjúka orsaka av jod mangul). Kvinnur, sum geva bróst, og sum hava smábørn, verða eggjaðar til at luttaka í átøkum, so sum at menna børn undir 2 ár, luttaka í undirvísing í heilsu og føðslugóðum mati og at býta út vitaminir o.l. Øll, sum luttaka í átøkunum, fáa mat.

- **Undirvísing.** Endamálið er at stuðla børnum at ganga í skúla. Ætlanin sampakkar við ætlanina hjá landinum um 10-ára skúlagongd. Átakið fevnir um eina heita máltíð um dagin til børn í forskúla og barnaskúla.

- **Matvørukreppa.** Endamálið er at fyribyrgja matvørukreppu og at læra at fyrisita náttúruskapta rávørutilfeingið. Familjurnar eru við í átøkum hjá kommununum og luttaka í arbeiðinum t.d. at gera vegir, brunnar, velta jørð og læra at handfara og umsita tilfeingið. Fyri hetta arbeiðið fáa luttakararnir mat.

WFP sendir ikki einstøku stuðlunum frágreiðingar um gongdina í verkætlanunum. Frágreiðingarnar verða í staðin lagdar á heimasíðuna hjá WFP. Gevarin fær eitt skrásetingarnummar, og kann á tann hátt fylgja gongdini í teim ymsu verkætlanunum. WFP byrjaði í 1996 at gera almennar frágreiðingar á henda hátt, og í dag nýta allir stovnar undir ST sama frágreiðingarhátt.

## *Tanzania*

Uttanríkisráðið hevur í 2008 játtað 55.120 kr., til at reka og menna barnagarðsskúla (nursery school) í Kobaha økinum í Tanzania. Peningurin er latin Mkuza Youth Development Association, stytt MYODA. Hesin felagsskapur fekk góðar 42.000 kr. í menningarstuðli í 2007.

Tanzania er flokkað í fátækasta bólki eftir flokkingini hjá OECD, og í landinum búgva um 37 milliónir fólk.

Endamálið hjá felagsskapinum er at menna ungdómin, og minka um fátækradømi.

Upprunaliga hevur MYODO fingið samband við Uttanríkisráðið gjøgnum Amaliu Danielsen, sum vegna Mellemfolkeligt Samvirke, hevur starvast hjá MYODO í Tanzania. Mellemfolkeligt Samvirke í Danmark hevur skrivstovu í Dar es Salam, og samstarvar við felagsskapin, sum varð skrásettur í 2005, men hevur virkað síðan 2003. Uttanríkisráðið hevur vent sær til skrivstovuna hjá MS í Dar es Salam, at biði tey um upplýsingar um felagsskapin og skúlan.



Mynd: MYODA

Uttanríkisráðið ætlar at fylgja skúlanum í nøkur ár framyvir, til tess at staðfesta hvør menning er, og hvussu stuðulin ávirkar skúlaumhvørvi á staðnum.

MYODA hevur latið roknskap inn fyri fyrstu játtanina, og letur Uttanríkisráðnum frágreiðing um gongdina í skúlanum í mai og roknskap í desember 2009.

### *Rwanda*

500.000 kr. vóru latnar Plan-International, ið er ein altjóða NGO´ari við høvuðssæti í London, at seta í gongd verkætlan í Rwanda, har børn og ung gjøgnum fjølmiðlar arbeiða við at fremja rættindi hjá børnum.

Í yvirlitinum hjá OECD, er Rwanda flokkað í fátækasta bólkinum. Í landinum búgva um 10 milliónir fólk.

Felagsskapurin Plan-International varð settur á stovn í 1937, og æt upprunaliga "Foster Parents Plan for Children in Spain". Endamálið var at fáa til vega mat, eitt stað at vera og útbúgving til tey børn, sum onkursvegna høvdu verið fyri vanlagnu orsaka av spanska borgarakrígnum. Felagsskapurin hevur ment seg, og stuðlar í dag børnum í 49 menningarlondum við ymsum verkætlanum. Í 1970 bleiv heitið broytt til Plan-International. 72% av inntøkunum stava frá faddurskipanum, meðan restin kemur frá ymsum gevarum.

Plan-International hevur vent sær til Uttanríkisráðið við uppskotum um fýra ymsar verkætlanir at stuðla. Tær eru um landbúnað, HIV/AIDS, sanitet og um rættindi barnanna. Hesar verkætlanir eru umrøddar við ráðgevandi nevndina, og semja er um, at vit eiga at stuðla verkætlanini um rættindi hjá børnum. Tað er torført at taka dagar í millum, men orsøkin til at valið fall á rættindi barnanna, byggir á málið um at fremja fólkaræði, sum er eini grundarsteinurin hjá ST, um hvussu vit fremja menningarsamstarv.

Í 1994 var fólkadráp framt í Rwanda, og um 800.000 fólk doyðu eftir bert 100 døgum. Miðlarnir høvdu tá ein ræðandi leiklut og vórðu m.a. nýttir at heita á hutuar um at gera sína skyldu at drepa tutsiar

Verkætlanin snýr seg um at førleikamenna børn, ung og fjølmiðlafólk, sum skulu lýsa og umrøða evnir, sum hava við børn og ung at gera. Á henda hátt tænir verkætlanin børnunum, og styrkir fólkaræði, eins og miðlarnar verða nýttir positivt.

Frágreiðing og grannskoðaður roknskapur verður latin inn til Uttanríkisráðið í november 2009.

### *Ghana*

Crude for Rural Deprived Children (CRUDEC) í Offinso í Ghana fekk í 2008 136.000 kr. í stuðli.

CRUDEC er ein sjálvboðin hjálparfelagsskapur, sum varð settur á stovn í 2004. Felagsskapurin er skrásettur hjá myndugleikunum og dagligur leiðari er Charlotte Ahenkang. Umsóknin er móttikin frá Katrin Dam á Neystabø, Biritu Wardum og Ásu á Neystabø, sum gjøgnum Mellemfolkeligt Samvirke hava starvast hjá CRUDEC sum sjálvbodnar í knappar 3 mánaðir.

Ghana er flokkað í næstfátækasta bólki undir OECD, og í landinum búgva um 23 milliónir fólk.

Peningurin skal nýtast til at byggja skúla.



Mynd: CRUDEC

Endamálið við verkætlanini er at veita útbúgvingarmøguleikar til børn við skerdum møguleikum í býnum Offinso í Ghana, har 35.000 fólk búgva. Familjurnar í økinum eru fátækar. Tær liva av jørðini og hava sjáldan meiri enn til dagliga føði, og tískil ikki ráð at lata børnini ganga í skúla. Við nýggja skúlanum fáa børnini betri umstøður at læra, og útlit verða fyri, at tey, ella nøkur av teimum, kunnu fáa víðari útbúgving. Hetta merkir, at grundarlag er fyri sosialum framstigum hjá næmingunum, og sosialu framstigini kunnu seinni í lívinum føra við sær búskaparligan vøkstur hjá tí einstaka og/ella lokalsamfelagnum.

Í løtuni ganga børnini í skúla, men hava so vánaligar umstøður, at myndugleikarnir á staðnum hava átalað hetta. Felagsskapurin hevur útvegað sær grundstykki, og somuleiðis er hóskandi innbúgv fingið til vega, sum ætlanin er, skal nýtast í nýggja skúlanum. Skúlin skal hýsa 275 børnum í aldrinum 2-16 ár.

Frágreiðing verður latin Uttanríkisráðnum í mai 2009 og roknskapur í desember 2009.

## *Malavi*

Menningarsamstarvspolitikkurin hjá ST er útgreinaður í sokallaðu "Millenium Development Goals 2015" og er greinaður í átta høvuðsmál. Eitt av hesum málum er at basa malaria og øðrum sjúkum. Malariafyribyrging verður best tryggjað við moskitonetum ella flugunetum, sum ein svevur undir.

Uttanríkisráðið metti, at peningurin, ið eftir var á fíggjarlógini fyri 2008, átti at verið nýttur til hetta endamál og vendi sær tí til Reyða Kross í Føroyum við fyrispurningi um tílíka verkætlan. Reyði Krossur arbeiðir við tílíkari ætlan í Malavi og avgjørt varð tí at lata 269.800 kr. til at keypa moskitonet til illa stødd fólk í Malavi.

Peningurin fór til verkætlan, sum nevnist Community Based Health Care Programme (CBHCP). Henda verkætlan er býtt í fimm evnir. 1) Fyrsta hjálp og heilsa, 2) Vatn og sanitet, 3) Móður - barn og heilsa, 4) HIV, 5) Førleikamenning.

Verkætlanin byrjaði í 2007, og verður í fyrstu atløgu til 2010. Hon fevnir um 14.000 húsarhald, sum er áleið 77.000 fólk. Higartil hevur ikki verið møguligt at finna stuðlar til moskitonet. Hetta tí togast hevur verið um, hvat er mest neyðugt at gera.

Malaria er sera nógv útbreitt í Malavi. Børn og kvinnur við barn, eru í størsta vandabólkinum. Malaria er orsøk til, at nógv børn og vaksin doyggja. 28% av teimum, sum doyggja á sjúkrahúsi, doyggja av malariasjúku. Tað eru ikki øll, sum hava ráð at fara á sjúkrahús, og tí koma nógvir sjúklingar ongantíð á sjúkrahús.

Verkætlanin stuðlar illa sjúkum og doyggjandi fólkum, foreldraleysum og øðrum útsettum bólkum eins og undirføddum børnum.

Moskitonetini verja tey, sum longu eru sjúk, at tey ikki fáa sjúkuna aftur. Moskitonetini verja sjálvsagt eisini tey, sum ikki hava fingið sjúkuna. Títtleikin av sjúkuni minkar, og lívsgóðskan verður betri hjá fleiri túsund fólkum.

Eitt moskitonet kostar áleið 60 kr. og játtaða upphæddin rakk sostatt til góð 4.000 net. Tá var um 10% tikið av til transport og umsiting.



Mynd: Uttanríkisráðið

***Virksemi nevndarinnar***

Eins og ásett í lógini, skal ráðgevandi nevndin veita myndugleikanum ráð at fremja lóg um altjóða menningarsamstarv í verki. Hesin setningur verður framdur soleiðis, at allar umsóknir, ið fyrisitingin metir lúka treytirnar í lóggávuni, verða lagdar fyri nevndina at umrøða. Harumframt umrøður nevndin eisini onnur mál og átøk, sum eru viðkomandi fyri at fremja lóggávuna í verki, nevnast kann t.d. roknskapur, eftirlitsvitjanir og eftirmetingar.

Í 2008 hevði nevndin sjey fundir, umframt ein evnisdag, har ymiskir spurningar um føroyskan menningarpolitikk vórðu viðgjørdir. Eitt nú varð viðgjørd, hvørt Føroyar eiga at avmarkað seg til ávís lond ella ávísir heimspartar, um Føroyar eiga at stuðla ávísum verkevnum, sum t.d. útbúgving og heilsu, og um verkætlanir eiga at verða stuðlaðar

saman við øðrum gevarum, ella um dentur skal leggjast á, at luttaka í smáum verkætlanum.

Harumframt vóru spurningarnir um býtið millum stjórnarfelagsskapir og sjálvbodnir hjálparfelagsskapir og um føroyska luttøku í menningarsamstarvi, bæði við vitan og við arbeiðsorku, eisini viðgjørdir.

Í nevndini eru Marita Rasmussen, forkvinna, stjóri í Vinnuhúsinum, Snorri Brend, næstformaður, blaðmaður, Lars Tostrup, stjóri í Norrønt Atlantssamstarv, Heðin D. Poulsen, løgfrøðingur og Óluva Niclasen, deildarleiðari á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

### *Annað*

Ein annar partur av menningarsamstarvi er at kunna um Føroyar og føroyskan førleika. Hetta var m.a. gjørt við grein um móðurmjólksverkætlanina í ferðavinnubløðunum Adventure Travel Magazine, ið kemur út í 20.000 eintøkum, seks ferðir um ári, og í Travel Magazine, ið kemur út í 105.000 eintøkum, tríggjar ferðir um ári. Bæði bløðini koma út í Bretlandi. Harumframt var greinin eisini á netsíðuni hjá The Travel Magazine, við tilvísing til Uttanríkisráðið og SamVit.

Endamálið var at vísa á, at Føroyar eru virknar innan menningarsamstarv og veitir ráðgeving á høgum stigi innan heilsupolitikk. Harumframt varð eisini víst á Føroyar sum ferðavinnuland.

Annar partur er at skapa føroyingum og føroyska samfelagnum royndir, kunnleika og áhuga fyri triðja heiminum og altjóða viðurskiftum sum heild. At liva upp til henda setning, hevur Uttanríkisráðið, vegna Mercy Corps, lýst eftir fólki at starvast við menningarsamstarvi á høvuðsskrivstovu teirra í Edinburgh. Uttanríkisráðið ætlar í 2009 at skipa fyri kunnandi átaki um, hvussu føroyingar kunnu fáa starv úti í heimi. Hetta verður gjørt saman við Reyða Krossi.

Føroyar fingu atlimaskap í FAO í november 2007. Limaskapurin gevur eisini møguleika fyri samstarvi innan menningarsamstarv. Í juni 2007 var skipað fyri ráðstevnu, har stjórnarleiðarar og fakfólk úr limalondunum viðgjørdu olju- og matvørukreppuna, sum serliga hevur rakt menningarlondini. Embætisfólk úr Uttanríkisráðnum luttók og var eisini á fundi við Small Islands Developing States, ið er skipaður undir FAO.

Luttikið hevur eisini verið á eftirmetingarfundi í danska Uttanríkisráðnum, har kunnað varð um, hvønn týdning eftirmetingarfrágreiðingar hava, og hvussu tær skulu gerast. Ætlanin er, at byrja at arbeiða við tílíkum eftirmetingarfrágreiðingum í komandi ári.

## Verkætlan enda

### *Indonesia - Fiskivinnumenning og trygd á sjónum*

Uttanríkisráðið hevur stuðlað økinum har tzunami flóðaldan rakti síðan 2004. Seinast við einari millión krónum, sum var til at menna fiskivinnumarknaðin og til undirvísing um trygd á sjónum.



Mynd: Marius Magnusson

Trygdarmiðstøðin í Klaksvík luttók við ráðgeving til partin um trygd á sjónum áðrenn verkætlanin fór í gongd. Stjórin á Trygdarmiðstøðini fylgdi somuleiðis skeiðinum, sum var í november, har frálæra var givin innan motorlæru og venjing á sjónum. Hann gav frálæruni góð skoðsmál.

Uttanríkisráðið hevur gjørt av at steðga stuðlinum til hetta økið, tí mett verður, at menningin higartil hevur gingið væl .

# Neyðhjálp lond

***Myanmar***

150.000 kr. vórðu veittar í neyðhjálp til Myanmar, fyrrverandi Burma, eftir at ógvuslig ódn 2. og 3. mai rakti suðurstrondina. Myndugleikarnir lýstu undantaksstøðu í fimm landslutum. Talan var um sera umfatandi oyðileggingar, og boðað varð frá, at meiri enn 22.500 fólk vóru deyð, at nógv túsund vóru saknaði, og at uppaftur fleiri túsund høvdu mist hús og heim.

Heimssamfelagið bjóðaði seg beinanvegin at veita hjálp, men tað gingu fleiri dagar áðrenn myndugleikarnir í Myanmar/Burma vildu, at hjálparfelagsskapir skuldu koma inn í landið.

Neyðhjálpin varð latin umvegis Reyða Kross, sum upplýsti, at hjálpin m.a. fór til líkposar, plastpresendingar, til fyribilstak yvir heimagjørdar smáttur, telt, gassapparatir, grýtir og pannir o.l. og til íløt at eta av og drekka úr, umframt rís og annað til matna. Harumframt bleiv arbeitt við at útflýggja heilivág fyrst og fremst fyri magasjúkur.

***Matvørutrot***

Um miðjan mars sendi World Food Programme út áheitan til heimsins stjórnir um at stuðla fíggjarliga, tí prísurin á mati og brennievni vóru øktir ógvusliga nógv. Avgjørt varð beinanvegin at játtað WFP 150.000 kr.

Peningurin fór í ein serligan grunn, sum bleiv settur á stovn í sambandi við áheitanina. Hagani varð stuðul síðan latin til tey átøk, sum WFP raðfestir.

Í áheitanini varð m.a. upplýst, at kostnaðurin á matvørum var hækkaður við 55% síðan juni í 2007. Og aftaná, at WFP 25. februar 2008 gjørdi kunnugt, at bráðfeingis tørvur var á fíggjarligum stuðli, hækkaðu matvørurnar aftur við umleið 20 %.



Mynd: WFP Robert Grossman

Uttanríkisráðið fekk skriv frá WFP, sum fegnaðist um stuðulin, og um at Føroyar høvdu borið so skjótt at. Føroyar hava latið stuðul til WFP síðan 2005. Upplýsingar um stuðul, sum ymsu londini hava latið, eru at síggja við at trýsta á heimasíðuna hjá WFP.

Uppgávan hjá WFP er at fyribyrgja hungursneyð og mattroti. Harumframt samstarvar felagsskapurin við lond um allan heim, sum eru rakt av ófriði, kríggi, turki, ódnarveðri og øðrum skaðahendingum.

# Samstarvspartar

**ABC-barnahjálp í Føroyum**
ABC barnahjálp í Føroyum er sjálvsognarstovnur við heimstaði og høvuðssæti í Tórshavn. ABC barnahjálp varð stovnað í 2007. Felagsskapurin hevur sín uppruna í Íslandi, har virksemi byrjaði í 1988. ABC barnahjálp í Føroyum samstarvar við og eftir somu meginreglum sum ABC Children´s International. Høvuðsendamálið er at útvega fátækum børnum í menningarlondum varandi hjálp við skúla, útbúgving og læknahjálp.

**The Circassian Charity Association, Woman´s Branch (CCA)**
The Circassian Charity Association, Woman´s Branch (CCA), ið er ein sjálvhjálparfelagsskapur í Jordan. Felagsskapurin varð skrásettur hjá myndugleikunum í 1972. Endamálið er at menna kvinnur og børn á økjum viðvíkjandi útbúgving, heilsu, mentan, búskapi og førleikamenning.

**Care for Rural Deprived Children (CRUDEC)**
CRUDEC er ein sjálvboðin hjálparfelagsskapur, sum varð settur á stovn í 2004. Felagsskapurin er skrásettur hjá myndugleikunum og dagligur leiðari er Charlotte Ahenkang. Høvuðsendamálið hjá felagsskapinum er at betra um umstøðurnar hjá børnum, sum vaksa upp undir fátøkum korum og sostatt hava skerdir menningarmøguleikar.

**Dialogos**
Dialogos er ein danskur sjálvboðin hjálparfelagsskapur, ið varð settur á stovn í 1993. Tað eru fyrrverandi u-landsfólk, ið hava stovnað felagsskapin. Høvuðsendamálið er at stuðla menningarlondum í teirri menningarleið, tey sjálvi hava valt.

**Mercy Corps**
Mercy Corps er ein sjálvboðin hjálparfelagsskapur, ið varð settur á stovn í 1982. Fyrsta menningar verkætlanin var í Honduras sama ár. Høvuðsendamálið er at berja niður líðing, fátækaradømi og trælkan við at byggja upp trygg, framleiðandi og rættvís samfeløg. Mercy Corps arbeiðir víða í heiminum og hevur høvuðssæti í USA.

**Mkuza Youth Development Association (MYODA)**
MYODA, er ein sjálvboðin hjálparfelagsskapur, sum formliga varð settur á stovn í 2005, tó at hann hevur virkað síðan 2003. Felagsskapurin virkar í Tanzania, og høvuðsendamálið er at menna ungdómin, minka um fátækaradømi og at basa HIV og Aids.

**Plan International**
Felagsskapurin Plan-International varð settur á stovn í 1937 og æt upprunaliga "Foster Parents Plan for Children in Spain". Endamálið var at fáa til vega mat, eitt stað at vera og útbúgving til tey børn, sum onkursvegna høvdu verið fyri vanlagnu orsaka av spanska

borgarakrígnum. Felagsskapurin hevur ment seg og stuðlar í dag børnum í 49 menningarlondum við ymsum verkætlanum. Í 1970 bleiv heitið broytt til Plan-International. 72% av inntøkunum stava frá faddurskipanum, meðan restin kemur frá ymsum gevarum. Visjónin hjá felagsskapinum er: Ein heimur har øll børn kunnu brúka sínar menningarmøguleikar í samfeløgum, sum virða rættindi og tign menniskjanna.

**Reyði Krossur**

Reyði Krossur Føroya varð stovnaður í 1926. Staðfest varð, at tørvur var á, at sjálvboðin kundu veita veikum í hesum samfelagnum hjálp og kunning. Gjøgnum Dansk Røde Kors, eru Føroyar limur í tí størsta heimsumfatandi hjálparfelagsskapinum, við til at kunna veita og fáa hjálp. Reyði Krossur hevur um 137 milliónir limir.

**World Food Programme**

WFP er sjálvstøðugur stovnur undir Sameindu Tjóðum. WFP varð sett á stovn í 1963. Endamálið er at basa hungri og hungursneyð, at betra um føðslu og dygd í mati hjá teim allar fátækastu fólkunum, og at tryggja burðardygga menning á staðnum.

# Listi yvir menningarlond

**DAC List of ODA Recipients**

**Effective for reporting on 2008, 2009 and 2010 flows**

| **Least Developed Countries** | **Other Low Income Countries**<br>(per capita GNI < $935 in 2007) | **Lower Middle Income Countries and Territories**<br>(per capita GNI $936-$3 705 in 2007) | **Upper Middle Income Countries and Territories**<br>(per capita GNI $3 706-$11 455 in 2007) |
|---|---|---|---|
| Afghanistan | Côte d'Ivoire | Albania | *Anguilla |
| Angola | Ghana | Algeria | Antigua and Barbuda[1] |
| Bangladesh | Kenya | Armenia | Argentina |
| Benin | Korea, Dem. Rep. | Azerbaijan | Barbados[2] |
| Bhutan | Kyrgyz Rep. | Bolivia | Belarus |
| Burkina Faso | Nigeria | Bosnia and Herzegovina | Belize |
| Burundi | Pakistan | Cameroon | Botswana |
| Cambodia | Papua New Guinea | Cape Verde | Brazil |
| Central African Rep. | Tajikistan | China | Chile |
| Chad | Uzbekistan | Colombia | Cook Islands |
| Comoros | Viet Nam | Congo, Rep. | Costa Rica |
| Congo, Dem. Rep. | Zimbabwe | Dominican Republic | Croatia |
| Djibouti | | Ecuador | Cuba |
| Equatorial Guinea | | Egypt | Dominica |
| Eritrea | | El Salvador | Fiji |
| Ethiopia | | Georgia | Gabon |
| Gambia | | Guatemala | Grenada |
| Guinea | | Guyana | Jamaica |
| Guinea-Bissau | | Honduras | Kazakhstan |
| Haiti | | India | Lebanon |
| Kiribati | | Indonesia | Libya |
| Laos | | Iran | Malaysia |
| Lesotho | | Iraq | Mauritius |
| Liberia | | Jordan | *Mayotte |
| Madagascar | | Macedonia, Former Yugoslav Republic of | Mexico |
| Malawi | | Marshall Islands | Montenegro |
| Maldives | | Micronesia, Federated States | *Montserrat |
| Mali | | Moldova | Nauru |
| Mauritania | | Mongolia | Oman[1] |
| Mozambique | | Morocco | Palau |
| Myanmar | | Namibia | Panama |
| Nepal | | Nicaragua | Serbia[3] |
| Niger | | Niue | Seychelles |
| Rwanda | | Palestinian Administered Areas | South Africa |
| Samoa | | Paraguay | *St. Helena |
| São Tomé and Príncipe | | Peru | St. Kitts-Nevis |
| Senegal | | Philippines | St. Lucia |
| Sierra Leone | | Sri Lanka | St. Vincent and Grenadines |
| Solomon Islands | | Swaziland | Suriname |
| Somalia | | Syria | Trinidad and Tobago[2] |
| Sudan | | Thailand | Turkey |
| Tanzania | | *Tokelau | Uruguay |
| Timor-Leste | | Tonga | Venezuela |
| Togo | | Tunisia | |
| Tuvalu | | Turkmenistan | |
| Uganda | | Ukraine | |
| Vanuatu | | *Wallis and Futuna | |
| Yemen | | | |
| Zambia | | | |

*Territory.

(1) Antigua & Barbuda and Oman exceeded the high income country threshold in 2007. In accordance with the DAC rules for revision of this List, both will graduate from the List in 2011 if they remain high income countries until 2010.

(2) Barbados and Trinidad & Tobago exceeded the high income country threshold in 2006 and 2007. In accordance with the DAC rules for revision of this List, both will graduate from the List in 2011 if they remain high income countries until 2010.

(3) At present aid to Kosovo is recorded under aid to Serbia. Kosovo will be listed separately if and when it is recognised by the UN.

As of April 2008, the **Heavily Indebted Poor Countries (HIPCs)** are : Afghanistan, Benin, Bolivia, Burkina Faso, Burundi, Cameroon, Central African Republic, Chad, Comoros, Congo (Dem. Rep.), Congo (Rep.), Côte d'Ivoire, Eritrea, Ethiopia, Gambia, Ghana, Guinea, Guinea-Bissau, Guyana, Haiti, Honduras, Kyrgyz Republic, Liberia, Madagascar, Malawi, Mali, Mauritania, Mozambique, Nepal, Nicaragua, Niger, Rwanda, São Tomé and Príncipe, Senegal, Sierra Leone, Somalia, Sudan, Tanzania, Togo, Uganda and Zambia.

# Neyðhjálp 2008

Í 2008 hava Føroyar veitt neyðhjálp í tveimum umførum. 300.000 kr. vóru settar av á løgtingsfíggjarlógini.

| Verkætlan | Endamál | Upphædd | Samstarvs-partur | Land | Tíðar-skeið |
|---|---|---|---|---|---|
| Myanmar ódn | Neyðhjálp | 150.000 kr. | Reyði Krossur | Myanmar | Mai |
| Matvørutrot | Neyðhjálp | 150.000 kr. | WFP | Grunn hjá WFP | Mars |

# Fíggjarnýtsla

**Menningarsamstarv 2008**

| | |
|---|---|
| **Játtan 2008** | **3.000.000 kr.** |

**<u>Verkætlanir</u>**

**Stuðul**

| | |
|---|---|
| The Circassian Charity Association, Jordan | 190.100 kr. |
| Dialogos, Bolivia | 589.850 kr. |
| Mercy Corps, Indonesia | 627.170 kr. |
| ABC-barnahjálp, Liberia | 270.000 kr. |
| World Food Programme, Senegal | 300.000 kr. |
| Mkuza Youth Development Association, Tanzania | 55.120 kr. |
| Plan International, Rwanda | 500.000 kr. |
| Crude for Rural Deprived Children, Ghana | 136.000 kr. |
| Reyði Krossur, Malavi | 269.826 kr. |
| | 2.938.060 kr. |

**Neyðhjálp 2008**

| | |
|---|---|
| **Játtan 2008** | **300.000 kr.** |

**<u>Verkætlanir</u>**

| | |
|---|---|
| Reyði Krossur, Ódn í Myanmar | 150.000 kr. |
| Hungursrakt lond, WFP | 150.000 kr. |
| | **300.000 kr.** |

# Lóg um altjóða menningarsamstarv

Løgtingslóg nr. 44 frá 14. mai 2007 um altjóða menningarsamstarv

Samsvarandi samtykt Løgtingsins staðfestir og kunnger løgmaður hesa løgtingslóg:

§ 1. Henda lóg skal leggja lunnar undir føroyska luttøku í altjóða samfelagnum at minka um búskaparliga ójavnan í heimi.
Stk. 2. Landsstýrið skal virka fyri hesum við at vera við í sjálvberandi menningarsamstarvi til frama fyri menningarlond, smbr. stk. 3. Samstarvið kann vera formligt sum óformligt.
Stk. 3. Í hesi lóg verða menningarlond skilmarkað á sama hátt sum hjá OECD.

§ 2. Landsstýrið kann hava menningarsamstarv við stjórnir í menningarlondum, stjórnir í øðrum londum, altjóða stjórnarfelagsskapir og aðrar felagsskapir, teirra millum føroyskar.
Stk. 2. Samstarvið kann fevna um fakliga ráðgeving og fíggjarligan stuðul til lutvísa fígging av verkætlanum í menningarlandi, har ætlanin er:
1) at skipa haldgóða fyrisiting,
2) at fáa búskaparvøkstur og
3) at tryggja sosial framstig
Stk. 3. Tá ið til ber, eiga føroysk vitan og føroyskur serkunnleiki at verða gagnnýtt og ment í sambandi við slíkar verkætlanir.

§ 3. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð neyvari treytir og reglur fyri, hvør kann fáa stuðul, og nær og hvussu stuðul verður játtaður. Her eru at nevna krøv til fíggjarætlan, eftirlit, upplýsingarskyldu, roknskap og grannskoðan hjá stuðulsmóttakara og afturrindan av stuðli.

§ 4. Nevnd fyri menningarsamstarv skal geva landsstýrismanninum ráð til at fremja hesa lóg í verki.
Stk. 2. Nevndin hevur formann og fýra limir, sum landsstýrismaðurin tilnevnir at sita í fýra ára skeið.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin ger fyriskipan fyri virksemi nevndarinnar.

§ 5. Henda løgtingslóg fær gildi 30. juli 2007

Tórshavn, 14. mai 2007

Jóannes Eidesgaard (sign.)
løgmaður